e-mail: jakup@sosialurin.fo

# Ítróttur

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

# Skert KÍ vitjar í Gundadali

*Fótbólturin um vikuskiftið: Pacek breyt kjálkabeinið hóskvøldið, og bæði hjá HB og KÍ eru fleiri aðrir leikarar ivasamir*

JÁKUP MØRK/JÓANNES HANSEN

Fult umfar, t.v.s fimm dystir verða leiktir í bestu mansdeildini um vikuskiftið, og hóast tað enn er stutt útliðið, so er beinanvegin líkt til, at nakrir spennandi dystir eru á skránni

**Lasarett í Klaksvík**

Klaksvíkingar og Tomislav Sivic eru í døpurhuga undan ferðini í Gundadal, har HB bíðar. Undan klassikaranum yvir allar aðrar í føroyskum fótbólti er tað greitt, at ein lyklaspælari er langtíðarskaddur, og at tríggir eru rættuliga ivasamir. Hetta var ikki júst tað, sum teir í Klaksvík hildu seg hava uppiborið eftir kiksaran móti NSÍ.

Undir venjing hóskvøldið breyt Pazek kjálkabeinið í tveimum støðum og verður tískil ikki við nógvar tær fyrstu vikurnar. Hin miðverjin, Jan Andreasen, hevur ikki vant í vikuni, tí hann varð skaddur í fótliðnum móti NSÍ. Teir í Klaksvík gera alt fyri at Jan skal vera klárur at spæla í morgin, men í gjár vóru teir ikki alt ov bjartskygdir.

Arnold Joensen varð skorin fyri brokk mikudagin. Teir rokna við, at hann kann spæla í morgin, men hetta man vera eitt sindur ivasamt. Undir venjingini hóskvøldið noyddist John Ryan at gevast. Hann hevði fingið ein vøddaskaða í lærið. Hvussu álvarsligur skaðin var, vistu teir ikki á døgurða í gjár.

HB kann við sigri í morgin leggja seg seks stig framum KÍ, sum hevur verið mett sum besta boðið uppá FM. Lagið í HB hevur sjálvsagt verið gott hesa vikuna, men hóskvøldið vórðu teir kløkkaðir. Ingi Rasmussen hevur leingi havt fótliðsskaða. Hann gavst at venja hóskvøldið. Tað gjørdu Hallur Danielsen og Rúni Nolsøe eisini, tí teir hildu seg kenna vøddaskaðar. Í HB vóna teir, at skaddu menninir kunnu pjøssast saman til í morgin. Pætur Dahl hevur verið skaddur, men hann vandi aftur hóskvøldið.

HB og KÍ hava ofta havt spennandi uppgerðir í Gundadali. Ikki minst tann í fjør var minnisrík. Tað var tá, at Kurt Mørkøre skoraði sigursmálið í síðstu løtu.

**Árstalsuppgerðin**

B68 fær vitjan av B36. Havnarliðið plagdi at hava tað trupult á Toftum, men síðani 1997, tá teir vunnu FM, hevur tað hilnast væl hjá B36 á Svangaskarði.

Felags fyri bæði liðini er, at tey hava saknað tríggjar landsliðsspælarar i vikuni.

Hjá B68 eru allir spælararnir tøkir. Uttan Jan Petersen, sum brákaði eitt rivjabein móti FS Vágum.

Tað gongst illa hjá B36 at loysa málverjaspurningin. Jens Marttin Knudsen, sum vardi málið seinasta sunnudag, kom til Føroya við hinum landsliðsspælarunum hóskvøldið, men hann og hinir landsliðsspælararnir, sum spæla í Íslandi, skuldu fara yvir aftur í gjárkvøldið.

Í vikuni hevur B36 enn einaferð havt ein íslendskan málverja á vitjan, men tá vit frættu ígjár, var Baldur Bragason á veg av landinum aftur.

Úr B36 frætta vit annars, at Tróndur Vatnhamar nú er afturkomin av flatlondum, og at hann helst verjir málið á Toftum. Eykamálverjin, Rene Torgarð, er framvegis skaddur.

Um annar málverji er á veg til felagið, vil Kristian á Neystabø, formaður í B36, ikki gera viðmerkingar til í løtuni.

B68 og B36 vóru í sama bólki í steypakappingini, og vann B68 dystin á Toftum, meðan javnleikur varð úrslitið í Gundadali.

**Bæði hava góðar vónir**

Vesturi á Eiðinum í Vági, taka vágbingar móti gestum av Sandoynni. Í fjør endaði dysturin við javnleiki, men stendur tað til vágbingar, sum hava allar mans tøkar til dystin, so verða øll stigini verandi har suðuri hesuferð.

Sandoyingar hava tó á ongan hátt mist mótið. Burtursæð frá Bjrøn Thorsteinsson, sum dregist við knæskaðan, sum hann fekk í steypakappingini, eru allir mans tøkir, frættist av Sandi. Jógvan Jón Petersen noyddist út móti HB, men roknað verður við, at eisini hann er klárur at taka nýtt tørn.

Annars siga sandoyingar seg ikki vænta nakran lættan dyst har suðuri. Hinvegin eru teir eisini fullgreiðir um, at talan helst ikki verður um nakrar lættar dystir, so í so máta kann tað gera tað saman, hvaðani stigini koma, og stig ætla teir sær við aftur norður um fjørðin.

**Fyrstu ferð í Sørvági**

Fyri fyrstu ferð skal landskappingardystur í fyrstu deild leikast í Sørvági. Ikki tí, SÍ hevur áður verið við í fremstu røð, men tá æt deildin meistaradeildin, og í so máta verður talan um søguskriving sunnudagin.

Mótstøðuliðið er NSÍ, sum higartil hevur staðið seg sera væl á útivølli í ár, og sum í fyrsta umfarinum megnaði at basa føroyameistarunum úr Klaksvík.

Vágamenn hava tó eisini fingið góð úrslit í steypakappingini, og hóast teir ikki fingu nakað við sær av Svangaskarði mánadagin, so er tað við góðum treysti, at teir nú fara undir fyrsta heimadystin. Bakus, sum royndi seg í okkurt um ein tíma á Toftum, og Darius, sum ikki fekk verið við ta ferðina, eru nú báðir um at vera klárir, so liði tykist nakað styrkt hesu ferð. Hinvegin verður ikki roknað við, at Kim Poulsen ella Eyðfinn Davidsen verða klárir.

Hjá runavíkingum eru allir mans tøkir, og venjarin, Trygvi Mortenesen, hevur góðar vónir. Hann heldur at nú ræður um at smíða meðan jarnið er heitt, soleiðis at liðið kann tryggja sær eina góða byrjan upp á árið. Samstundis ávarar hann tó moti ov stórum bjartskygni, tí hann sigur seg hava stóra virðing fyri vágamonnunum.

**Ikki stórsigur**

Seinasti dysturin verður í Gøtu, har sumbingar koma á vitjan. Tey bæði seinastu árini er hesin dysturin endaður við risasigri til gøtumenn, men Johan Nielsen heldur ikki, at orsøk er til at taka nakra gleði upp á forskot. Gøtumenn tykjast enn ikki at hava somu styrki sum undanfarin ár, og harumframt mugu teir vera Helga L. Petersen fyri uttan, tí hann fekk reytt kort í dystinum móti B36 mánadagin.

Úr Sumba frættist, at har eru fleiri mans tøkir nú, enn tað vóru undanfarna vikuskifti. Páll Magnar Kjærbo er tó framvegis ikki komin heilt fyri seg, og harumframt er Birgir Jørgensen eisini ivasamur. Hinvegin eru Dánjal Johan Joensen og Jan Poulsen nú aftur tøkir, so tað er við vónum um eitt líkinda úrslit, at sumbingarnir leggja leiðina norðureftir.

## Dystir um vikuskiftið

**1. deild menn, 2. umfar**

| | | |
|---|---|---|
| 30.04 | FS Vágar-NSÍ | Kim Ejdesgaard |
| 30.04 | B68-B36 | Niklas á Líðarenda |
| 30.04 | GÍ-Sumba | Birgir Sondum |
| 30.04 | VB-B71 | Petur Reinert |
| 30.04 | HB-KÍ | Jens Petur Brattalíð |

**2. deild menn, 1. umfar**

| | | |
|---|---|---|
| 29.04 | GÍ-TB | Jákup Martin Kjeld |
| 29.04 | B36-KÍ | Hans F. Hansen |
| 29.04 | ÍF-LÍF | Tummas Pauli Olsen |
| 29.04 | NSÍ-HB | Regin Egholm |
| 29.04 | Royn-EB/Streymur | Eiler Rasmussen |

**3. deild menn, 2. umfar**

| | | |
|---|---|---|
| 30.04 | FS Vágar-Skála | Ólvaur Weihe |
| 30.04 | B68-B36 | Dagfinn Olsen |
| 30.04 | ÍF-TB | Kristian Joensen |
| 30.04 | VB-B71 | Jens Albert Simonsen |
| 30.04 | AB-KÍ | Arni Gunnarson |

**Kvinnudeildin**

| | | |
|---|---|---|
| 30.04 | HB-VB | Jóhan Krogh |
| 30.04 | Sumba-GÍ | Frits Poulsen |
| 30.04 | Skála-AB | EB/Streymur |
| 30.04 | KÍ-NSÍ | Jón Kári Frederiksen |
| 30.04 | EB/Streymur-B71 | Magni Hansen |

## TIPS 13

*Vika 17. • 23.-29. apr.*

*Seinasta freist leygard. kl. 14.50*

*Við Rúna Nolsøe*

| Nr. | Dystur | Kapping | 1 | X | 2 |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Aston Villa – Coventry | Enska Premier League | 1 | x | |
| 2 | Chelsea – Liverpool | Enska Premier League | 1 | x | 2 |
| 3 | Everton – Arsenal | Enska Premier League | | x | 2 |
| 4 | Newcastle – Coventry | Enska Premier League | 1 | | |
| 5 | Southapmpton – Leicester | Enska Premier League | 1 | X | 2 |
| 6 | Tottenham – Derby | Enska Premier League | 1 | x | |
| 7 | West Ham – Middlesbrough | Enska Premier League | 1 | | 2 |
| 8 | Charlton – Ipswich | Enska fyrsta deild | 1 | x | 2 |
| 9 | Crewe – Bolton | Enska fyrsta deild | | X | 2 |
| 10 | Huddersfiel – Stockport | Enska fyrsta deild | 1 | | |
| 11 | Nottingham Forest – Port Vale | Enska fyrsta deild | 1 | | |
| 12 | Swindon – Barnsley | Enska fyrsta deild | | x | 2 |
| 13 | Walsall – Pourtsmouth | Enska fyrsta deild | 1 | x | 2 |

STIMOROL HORNIÐ



# 2. deild í gongd

*Í dag verða fyrstu dystirnir í næstbestu fótbóltsdeildini leiktir, og so er alt fótbóltsárið farið á rull*

JÁKUP MØRK

Flestu av hinum fótbóltsdeildunum fóru undir sínar kappingar fyri viku síðani, men orsakað av tøttu steypaskránni um páskirnar hevur næstbesta deildin bíðað eina viku.

Fimm dystir standa á skránni, og líkt er eisini til, at summir av hesum kunnu gerast rættuliga áhugaverdir.

**Óli til Gøtu**

Í gøtu hittast næstbestu liðini hjá GÍ og TB. Mest áhugaverda við hesum dysti er helst, um Óli Johannesen verður við á TB liðnum.

Tá vit frættu seinast, var spæliloyvi enn ikki komið til landið, men havandi í huga, hvussu skjótt eitt líknandi loyvi varð avgreitt fyri knappari viku síðani, er lítið at ivast í at hetta kemur í rættlag.

Áhugavert er eisini í hesum sambandi, at Gøta verður fyrsti staðið har Óli skal royna seg. Tað var jú júst GÍ, sum eisini vildi hava fatur á landsliðsleikaranum, men sum kunnugt valdi hann barndómsfelagið, og við landsliðsleikaranum á liðnum, hava tvørámenn fingið sær ein avgerandi fyrimun, longu áðrenn dysturin er byrjaður.

**Tey næstbestu royna seg**

Næstbesta liðið hjá klaksvíkingum skal eins og besta liðið til Havnar at royna seg. Onnur deild hjá KÍ skal tó royna seg móti B36, sum nú aftur hevur lið í næstbestu deildini.

Í fjør var B36 liðið fullkomuliga einaráðandi í triðju deild, og spennandi verður nú at síggja, hvussu leikur fer at fara í ár. Klaksvíkingar hava nú staðið sína roynd í 2. deild í nøkur ár tilsamans, og lítið er tí at ivast í, at teir fara at gera sítt fyri at prógva, at tað er munur á fótbóltsspælinum í triðju- og aðru deild.

**Líkist toppdysti**

Hóast tað enn ikki eru leiktir nakrir dystir í deildini, so kann dysturin í Fuglafirði nærum rópast fyri toppdyst.

Talan er um niðurfluttu fuglfirðingarnir, sum skulu royna seg móti grannunum úr Leirvík, sum tey bæði undanfarnu árini hava vunnið silvurmerki í aðru deild.

Einki er at ivast í, at bæði feløgini hava ætlanir um at enda ovarlaga í deildini, og tí er eisini umráðandi at fáa eina góða byrjan. Tá talan samstundis er um grannauppgerð, skuldu allar fortreytir fyri einum spennandi dysti verið til staðar.

**Alt kann henda**

Í Runavík skulu næstbestu liðini hjá NSÍ og HB royna seg. Bæði liðini mugu metast at vera heimahoyrandi í aðru deild, hóast tey neyvan vera millum liðini, sum skulu taka sær av heiðursmerkjunum seinast í september mánaði.



*Óli Johannsen verður nú aftur at síggja í heimligu kappingin. TB hevur leiga landsliðsleikaran tað, sum eftir er av donsku kappingini*

Mett eftir úrslitunum frá undanfarnu árum, mugu havnarmenninir metast sum lítlir favorittar, men runavíkingar hava fyrimun av heimavølli, so tað líkist einum dysti, har alt kann henda.

**Royn tykist sterkari**

Seinasti dysturin hetta umfarið verður í Hvalba, har EB/Streymur kemur á vitjan. Hvalbingar standa seg vanliga sera væl á heimavølli. Harumframt hevur EB/Streymur onkursvegna vanliga sera torført við at fóta sær fyrstu umførini av kappingini, og tí talar alt fyri einum heimasigri í hesum dysti.

Hetta er eisini neyðugt, um hvalbingar ætla sær at røkka teimum hæddum, sum liðið reið á í áttatiárunum, men sundalagsmenn ætla sær helst eisini at hava okkurt orð at siga í hesum sambandi.

# Rúni tippar

*Veddingarmaður okkara hesa vikuna er liðskaparin hjá HB, Rúni Nolsøe*



*Umframt at royna seg móti KÍ, skal Rúni Nolsøe eisini royna seg í tipping hetta vikuskiftið*

JÁKUP MØRK

Tað er longu langt síðani, at Rúni Nolsøe av fyrstan tíð prógvaði, at dugur er í honum á fótbóltsvøllinum.

Nú skal hann so eisini royna kynstur síni uttanfyri fótbóltsvøllin, tá hann á hesum síðum fer at gita um úrslitini í ensku kappingini.

**Fáir greiðr favorittar**

Veddingarseðilin hesu ferð er anars merktur av, at talan er um óvanliga fáar greiðar favorittar.

Eisini verður veddingin nakað torførari, tá vit nú nærkast endanum av kappingarárinum, tí tað er júst um hesa tíðina, at liðini í báðum endum av stigatalvuni veruliga spíla seg úr, meðan tey í miðjuni kanska eru farin at hugsa meira um komandi kappingarár.

**Tríggjar sikrar**

Veddingarskipanin er hin vanliga, U-4-6-100, og hetta merkir so eisini, at tríggir sokallaðir sikrir dystir skulu finnast.

Rúni hevur satsað upp á tríggjar heimasigrar í hesum dystum, Newcastle-Coventry, Huddersfield-Stockport og Nottingham Forrest-Port Vale.

Hevur Rúni kollgitt hesar tríggjar dystir, eru góð útlit fyri einum vinningi.

**Upp á skift**

Sum kunnugt eru tað liðskiparnir á teimum fýra liðum, sum í fjør endaðu ovast í landskappingini.

Fyri viku síðani royndu John Petersen og Magni Jarnskor at gita um úrslitini, og komandi vikuskiftið verður tað ein av føroyameistarunum úr Klaksvík, Jan Joensen, sum fer at meta um, hvar krossarnir á veddingarseðlinum skulu setast.

# Fimleikakapping á Kambsdali

*Leygardagin og sunnudagin skipar Fimleikasambandið fyri kapping í reiðskapsfimleiki*

Jákup Mørk

Føroya Fimleikasamband boðar í tíðindaskrivi frá, at kapping í reiðskapsfimleiki fyri yngru bólkarnar verður á Kambsdali um vikuskiftið. Kappingin verður hildin á Kambsdali, og verður kappast í tveimum bólkum hjá ávíkavist gentum og dreingjum, soleiðis at talan er um fýra kappingar tilsamans. Talan er um aldursbólkarnar 9-11 ár og 12-13 ár.

Kappingin er býtt sundur soleiðis, at leygardagin verður liðkapping, har luttakandi liðini eru Havnar fimleikafelag, Støkk av Glyvrum, Fok úr Gøtu og Ljósið úr Havn.

Sunnudagin verður einstaklingakapping við luttakarum úr somu feløgum. Umleið 70 luttakarar eru við í kappingunum teir báðar dagarnar.

Kappast verður í lopi, gólvíðkan, á bita og í ringum. Serliga tykist áhugin at vera stórur fyri gólvíðkanunum, har framburðurin hevur verið sera stórur, síðani nýggja fimleikagólvið varð tikið í nýtslu fyri trimum árum síðani.



*Leygar- og sunnudagin verður kapping í reiðskapsfimleiki hjá yngru íðkarunum hildin á Kambsdali*

# Bragdið skipar fyri kapping

*Fyrsta kappingin hjá Bragdinum verður leygardagin*

Leygardagin 29 apríl skipar Bragdið fyri fyrstu kasti kapping í ár. Tað snýr seg um ein kasti 5-kamp fyri menn og ein kasti 4-kamp fyri kvinnur.

Greinarnar sum menninir kappast í eru: Hamarkast, Kúlustoyt, diskoskast, vektkast og spjótkast. Kvinnurnar kappast í: hamarkast, kúlustoyt, diskoskast og spjótkast.

Kappingin byrjar kl. 13.00. Luttøkugjald 50,- kr. fyri hvønn persón. Øll eru vælkomin.